**FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS**
**MAI - JUNI 2004**
**SKRIVLIG FRAMSETING**



# FØROYSKT

**4 tímar**

**Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.**

## Vel eitt av hesum evnum:

1 Tey flestu eru fyrimyndarlig
2 Ójavnt er býtt
3 Javnstøða og javnrættindi
4 „At ferðast er at liva”

# 1 Tey flestu eru fyrimyndarlig

Les tekstin

- Sig tína hugsan um náttarravnarnar
- Hvat heldur tú um støðuna hjá teimum ungu?



**Náttarravnarnir í Havn halda, at tey ungu eru røsk at hjálpa, tá ið vinfólk koma illa fyri av rúsi**

Tone Kjeld er sjálv triðja farin at ganga sum náttarravnur hesa sunnunáttina, Fregnir hittu hana. Hetta hevur hon gjørt í tvey ár.

Hon heldur, at tað fyrst og fremst er hjálpsemi, ið eyðkennir tey ungu, sum royna flogið um vikuskiftið.

– Til dømis, tá ið dansur er í Badmintonhøllini, kemur meir enn so fyri, at heilt ung missa tamarhaldið á alkoholinum. Tey vita ikki, hvussu nógv tey tola. Men vinfólkini eru røsk at taka sær av hvør øðrum. Tey ringja eftir hýruvogni ella koma til okkara, tí tey onga telefon hava ella av øðrum orsøkum. Vit kunnu hjálpa teimum við at ringja heim til foreldrini, so tey óhepnu kunnu verða avheintað. Men tað er ikki hetta, ið eyðkennir ungdómin: at hann liggur avveltur í gøtunum, leggur Tone áherðslu á.

*(Myndaeigari: Arni Clementsen)*



*(Myndaeigari: Arni Clementsen)*

Eins og tey fimm ungu, sum Fregnir tosaðu við á beinkinum í gongugøtuni, harmaðist Tone um, at tey, sum eru yngri enn 18 ár, ikki hava nógvastaðni at fara leygarkvøld. Men hon heldur, at hóast hesi ungu á ein hátt eru slept upp á fjall í hesum høpi, duga tey væl at bera seg at.

– Tað er hóast alt bara ein evarska lítil prosentpartur, sum elvir trupulleikar, og hesin bólkur er jú sera sjónligur. Eg vildi sagt, at eini 95% eru fyrimyndarlig. Og hóast tey heilt ungu ikki sleppa inn í dansistøðini, eru tað ikki tey, ið síggjast mest í gøtunum. Eg eri ovfarin av góða skilinum, tá ið eg hugsi um, hvussu lítið er at bjóða teimum ungu, sigur Tone.

– Ein av orsøkunum til, at Náttarravnarnir vórðu stovnaðir í 2001, var ein álvarsligur knívstilburður uttan fyri Badmintonhøllina í Gundadali. Tá tóku foreldur seg saman og vildu forða fyri, at harðlig harkalið skuldu taka valdið í gøtunum, so hampafólk ikki tordu at fara í býin.

– Vit hava náttarravnadag í september á hvørjum ári. Tá verða átøk gjørd fyri at fáa nýggjar limir. Onnur foreldur koma jú afturat, so hvørt sum børnini hjá teimum fara at ganga í býnum, endar Tone.

*(Fregnir nr. 3, 2003)*

2

# Ójavnt er býtt

Les tekstin

- **Ger viðmerkingar til tekstin**
- **Skriva so um tína støðu í alheimshøpi**

## Hugsa um hetta!

Vaknaði tú í morgun og kendi teg frískan – so ert tú hepnari enn 1 millión fólk, sum doyggja hesa vikuna!

Hevur tú ongantíð upplivað kríggj, einsemi í fongsli, ongantíð hoyrt nístini frá fólkum, sum verða pínd ella svølta
– so ert tú hepnari enn 500 milliónir fólk um allan heimin!

Kanst tú fara í kirkju ella á møti uttan at verða hóttur, handtikin ella dripin – ert tú hepnari enn 3 milliardir fólk um allan knøttin!

Fært tú nóg mikið at eta, hevur klæði at fara í, tak yvir høvdið og song at sova í
– so ert tú ríkari enn 75% av heimsins fólkum!

Hevur tú pening í bankanum, nakrar krónur í lummanum ella bara nøkur oyru í einum blikki
– so ert tú millum 8% av teimum ríkastu fólkunum á jørðini!

Bara av at lesa hetta, ert tú tvífalt heppin, tí at onkur er, sum hugsar um teg, og tú telist ikki ímillum tær 2 milliardir menniskju, sum hvørki duga at lesa ella skriva.

*(Teldubræv: "Altjóða vinavika," desember 2003)*







3

# Javnstøða og javnrættindi

Les tekstin niðanfyri

- **Skriva, millum annað við støði í tekstinum, tína hugsan um javnstøðu og javnrættindi ímillum kynini**

## Innhugsin yrkjari í útoyggj

Hugsi ofta um hvussu Føroyar
síggja út í dag

tey siga mær at tær eru minst líka so vakrar
sum tá ið fyrsti maðurin setti fótin
á land har fyri fleiri hundrað
árum síðani

munnu tær eisini vera líka so vakrar
sum tá ið fyrsta kvinnan
setti fótin á land har

nær var tað?

tað veit eg ikki

so telur tað ikki við

hví?

tað sigur søgan einki um.

*(Alexandur Kristiansen: "Gud er danskari enn Guð," 2003)*

# 4

# „At ferðast er at liva”

Hetta er eitt tiltak, H. C. Andersen í sínari tíð festi á blað

- **Skriva um evnið**









